


# Bilur hjá løgregluni fór í knús

**Tað hendir seg eisini, at løgreglan er við í ferðsluóhappum. Tað hendi eisini fríggjadagin**

ÓHAPP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fríggjadagin fór ein løgreglubilur í knús, tá ið hann var við í einum ferðsluóhappið.

Óhappið hendi á Bøllureyni uppi á Oyggjarvegnum, tá ið ein politibilur á veg norðureftir, skuldi leggja ein annan bil afturum.

Men hin bilurin ansar ikki eftir, at hann verður yvirhálaður, tí tá ið politibilurin er undir liðini á hinum, snarar hann inn fyri politibilin, sum fór útav vegnum og bóltaði einar tvær ferðir runt.

Tveir politistar vóru í bilinum. Teir sluppu snikkaleysur frá óhappinum, men sjálvur løgreglubilurin fór so illa, at hann er helst vrak.

Eitt slíkt óhapp verður viðgjørt sum øll onnur óhapp. Tað merkir, at frágreiðing verður skrivað og so tekur fútin støðu til, um meiri skal gerast við málið.

## Hugleiðing um kirkjuna millum tjarna

Har sum áður bert vaks gras og berjalyngur
Kirkjan nú stendur, broyttist sjónarringur
Har sum piltar ferðaðust í haga
Fóru ferðir, upp um garð at kaga
Har sum vilt var óbygt lendi
Funnu nýggjar leiðir, ongin kendi
Millum tjarnir, onki mundi saka
Bóru byrðar, sigldu har við flaka
Tíðin brátt við øllum fór
Hagin hvarv og bygdin stór
Har alt vaks og nørdist
Grógvin partur av Havnini gjørdist
Kirkjan nú stendur, sjón for søgn
Millum Tútakannu- og Myllutjørn
Dagar mót himni, hon stásilig stár
Hon boðini ber, fara dagar og ár
Um enn fjarskotin ella heima
Hugur so ofta í Hoyvík man sveima
Tíðir broytast, eins og hugur barna
Stolt stendur kirkjan millum tjarna

2. nov. 2007
D. Olsen




## Kunningarleiðari til Felagið Vágar

Felagið Vágar er eitt felag sum rekur Vága Kunningarstovu og umboðar ferðavinnuna, handilsvinnuna og aðra vinnu.

**Søkt verður eftir kunningarleiðara, starvið er tíðaravmarkað til 3 ár.**

Leingjan av starvstíð er treytað av framhaldandi fígging.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá Kunningarleiðaranum eru m.a.**
- At kunna um Vágar – Mykines
- At marknaðarføra Vágar og Mykines við faldarum o.ø.
- At menna og samskipa handils- og tænastuvinnuna í økinum.
- At kunna um tiltøk innan mentan í økinum
- At dagføra heimasíðuna hjá felagnum Vágar
- At hava dagligu leiðsluna av felagnum Vágar.
- At hava ábyrgd av fíggjarstýringini.

**Kunningarleiðarin skal kunna:**
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir.
- Hava hollan málkunnleika
- Hava teldukunnleika
- Royndir innan ferðavinnu er ein fyrimunur

Nærri fæst at vita við at venda sær til Eyð Ellingsgaard nevndarformann á tlf. 221431.

Løn sambært avtalu.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi innan 15. november 2007.

**Felagið Vágar**
**Eyð Ellingsgaard**
**380 Sørvágur**

## Goymslu- og handilslærlingur

Søkt verður eftir goymslu- og handilslærlingi til P/F Vónina í Fuglafirði at byrja skjótast gjørligt.

**Arbeiðið umfatar m.a.:**
- beinleiðis sølu frá goymsluni
- dagliga avgreiðslu av telefonbíleggingum
- goymslustýring (Navision Attain)

**Vit ynskja at tú hevur HH ella FHS og vænta at tú:**
- ert framfýsin og ágrýtin
- hevur lætt við at samskifta
- ert áhugað/ur í fiskivinnuni
- hevur teldukunnleika

Lønin er sambært galdandi sáttmála.

Umsókn, saman við møguligum prógvum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. november.

*P/F VÓNIN*
BAKKAVEGUR 22 · POSTBOKS 19
FO-530 FUGLAFJØRÐUR · TLF. 474200